# Svarskriv til lesarabræv frá Peturi Hermansen

**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Petur Hermansen hevur í opnum lesarabrævi til borgarstjóran og teknisku deild tann 29. mai 2006 víst á truplu ferðsluviðurskiftini í Havnini, sum hann sigur, hava sæð út sum eitt »rótthol«. Petur vísir eisini á, at ongar forðingar skuldu verið fyri, at arbeitt um veturin, tí, sum hann vísir á, so hava vit »ongan vetur havt nú í mong ár«.

Fyrst er at siga, at tað er gleðiligt, at borgarar í kommununi geva ferðsluni ans, eins og eitt vakið eygað verður hildið við tí arbeiði, kommunan stendur fyri. Tað er eisini í fínasta lagi, at ein sokallaður "peikifingur" verður havdur á lofti, og mint verður á, hvussu reinur býurin eigur at vera. Men tað er nú eina ferð ikki so einfalt at leggja til rættis alt arbeiði í kommununi, soleiðis sum Petur og óivað mong onnur kundu hugsað sær.

Sum kunnugt eru nógv arbeiði í alt árið ymsastaðni í kommununi og ikki einans um summarið, sum tað verður víst á. Eg skal tó geva Peturi rætt í, at nøkur grevstrararbeiði í Havn órógva ferðsluna eitt sindur. Tíverri slepst ikki undan slíkum arbeiðum, men tað verður altíð roynt at laga hesi soleiðis, at tað darvar ferðsluni og borgarum annars sum minst.

Kloakkeringsarbeiðið í J. Paturssonar gøtu er týðiligt dømi um hetta. Kommunan hevur valt at fara undir hetta arbeiði nú ið tað er ljóst og góðveður er, tí tá er minni møguleiki fyri, at arbeiðið gerst óneyðuga drúgt orsakað av vánaligum veðri. Kommunan hevur harumframt valt at seta trygdina hjá arbeiðsfólkunum og trygdina hjá ferðsluni í hásætið við ikki at fara undir arbeiðið í myrku tíðini.

Hetta kloakkarbeiðið í J. Paturssonar gøtu skal vera liðugt áðrenn ólavsøku, og so skuldi friður valdað á tí økinum.

At hava ein reinan bý er og eigur at vera ein sjálvfylgja. Men at røkka hesum máli er neyðugt at gera tað, sum skal til, og tað vil ofta vera arbeiði, sum so ella so gera seg inn á »mobilitetin« í býnum. Tað er jú ikki fyri at gera seg inn á borgarar í Havnini, men fyri at skapa bestu fyritreytir fyri einum reinari býi, at arbeitt verður miðvíst við at betra umhvørvið. Málið er framhaldandi at fáa lagt kloakkleiðingina longur út eftir J. Paturssonar gøtu, men hetta verður gjørt seinni. Kommunan raðfestir umhvørvið sera høgt.

Petur nevnir eisini, at tá ið summarið er farið at halla, so verður farið undir at strika. Okkara fólk við hesi uppgávuni eru fyri langari tíð síðani farin undir at strika, og tað sæst eina mest aftur, tá miðstrikurnar á størru vegunum verða gjørdar. Og Petur veit fullvæl, at helst eru píkarnir ein høvuðsorsøk til stórar útreiðslur at viðlíkahalda asfalt og strikur í kommununi. Tí kann berst ásannast, at jú fyrr vit sleppa av við píkarnar, jú reinari verður okkara býur. Og enn sum áður er mál okkara, at »Havnin skal skína«, men tað krevur tíverri eisini viðhvørt, at neyðugt er at arbeiða ta tíðina á árinum, tá ið arbeiðandi er.

# Rasmussen og Kierkegaard

**LEIF JACOBSEN**
Eiði

I SvF-udsendelsen Ekko udtalte Ólavur Rasmussen følgende fra prædikestolen: "Dette oplever vi hver dag, også i trossamfund her i landet, hvor såkaldte profeter helt ansvarsløst på daglige meget vilde vækkelsesmøder hidser folk op, for at få medlemmer til sekten og penge i kassen. Det, som det hele drejer sig om, er at få magten over folk, så de ikke gennemskuer, at dette er et skuespil, hvor hovedprædikanterne er ligeså splitternøgne som kejseren i H. C. Andersens eventyr."

Ólavur Rasmussen glemmer at oplyse, hvorledes folkekirken sikre sig på en særdeles opfindsom måde, dels gennem den ualmindelig snedigt iscenesatte og statsinstitutionaliserede hvervekampagne i 13-14 års alderen (konfirmationen), dels gennem uigennemskueligheden i kontingentbetalingen.

Kontingentet til den evangelisk-lutherske kirke betales over skatten, således at medlemmerne hverken månedligt eller årligt modtager en overskuelig opkrævning på beløbet, sådan som det er tilfældet for medlemskab af enhver anden forening eller organisation.

Hvor stor mon ville kirken reelt være i form af kontingentbetalende medlemmer, hvis kirkens privilegier forsvandt, og indmeldelse og kontingentbetaling foregik på helt gennemskuelig facon? Det ville være mere fair over for det enkelte menneske såvel som de øvrige trossamfund, at medlemskabet foregik efter myndighedsalderen, eller i det mindste uden statens mellemkomst, samt at kontingentbetalingen foregik helt ordinært i stedet for over skatten.

Den kristne tro antages imidlertid ved dåben og bekræftes ved konfirmationen, hedder det. Her indvilliger 13-14-årige - under stor festivitas og ofte betragtelige pengegaver fra familie og venner - dog i mere end at »tro«. Man melder sig nemlig tilmed ind i et trossamfund til en på længere sigt ret høj pris, der aldrig nogen sinde udspecificeres, og hvis nytestamentlige fundament sågar temmelig utvetydigt modstiller religion og lokkemidlet mammon: »I kan ikke tjene både Gud og mammon« (Matt. 6, 24).

Søren Kierkegaard, ikke ukendt af Ólavur Rasmussen, kalder konfirmationen for »langt dybere Nonsens« end barnedåben - men anerkender dog snedigheden i foretagendet set med præsteskabets øjne: »Derimod er dette Nonsens i en anden Forstand snildt nok, tjenende Præsteskabets Egoisme, der meget godt forstaaer, at hvis Afgjørelsen i Forhold til Religion forbeholdtes Mandens modne Alder (det eneste Christelige og det eneste Fornuftige) vilde Mange maaskee have Charakteer nok til ikke skrømtet at ville være Christne.« (Øieblikket nr. 7).

Store lønninger, vederlag og frynsegoder er i forskellig udstrækning statskirkens gave til sine mange ansatte - der vidner om kirkens folkelige »tilslutning« og utrætteligt udbreder den kristne tro, ikke sandt? Eller udbreder de måske i virkeligheden bare den kristne kirke?

Kierkegaard mente det sidste. Og hans kirkekamp er aldrig nogen sinde blevet forsøgt imødegået seriøst og overbevisende af den kirke, hvis repræsentanter ikke desto mindre så gerne vil tage den verdensberømte teolog og filosof til indtægt for kristendommen (uden at skelne mellem kirkens og det Nye Testamentes modsætningsfyldte versioner, vel at mærke).

Kierkegaards oprør er simpelt hen en for ubehagelig og uadskillelig side af hans virke og forfatterskab, som bedst ties ihjel eller bagatelliseres af det selv samme statslige præsteskab, som han betragtede som stående i et modsætningsforhold til kristendommen.

Til sidst om Ólavur Rasmussens og folkekirkens fundament(alisme):

Den danske luthersk-evangeliske folkekirkes fundament består ud over bibelen af følgende fem skrifter: Den apostolske trosbekendelse, den nikænske trosbekendelse, den athanasianske trosbekendelse, Luthers lille Katekismus og den augsburgske bekendelse. Folkekirken er i kraft af sidstnævnte funderet på en eksplicit intolerance over for islam, idet bekendelsen omtaler »tyrken« som »det kristne navns og den kristne religions argeste gamle arvefjende«, og som ligeledes i artikel 1 »fordømmer« bl.a. »Muhamedanerne« og andre »kætterier«. Ikke noget særsyn for den reformator, der har lagt navn til den luthersk-evangeliske folkekirke. Hvad han mente om »kættere« lader sig vanskeligt misforstå: »Man behøver ikke have så meget bryderi med kættere, man kan dømme dem uden at høre, hvad de har at sige til deres forsvar.« Ikke uden grund brugte nazisterne Luthers skrift Mod jøderne og deres løgne fra 1543 i propagandaen mod jøderne, »dette fordærvede, fordømte jødefolk«, for at »redde vore Sjæle fra Jødernes Indflydelse«. Det skulle ske ved for det første »at opbrænde deres Synagoger med ild (…) For at Gud kunde se, vi mente det alvorligt, og hele verden kunne tage efter vort Eksempel (…) For det andet: At man tog alle deres Bøger fra dem, Bønnebøger, Talmud, selv hele Bibelen, og ikke skaanede et blad, og opbevarede dem, til de omvendte sig (…) For det tredje: At man forbyder dem hos os og i vore Huse offentlig at prise Gud, at takke, bede, undervise, under fortabelse af Liv og Lemmer (…) Så er jeg da kommen til denne Slutning: Skal vi blive fri for Jødernes Bespottelse og ikke blive delagtige i den, så maa vi bestemme os til at fordrive dem fra vore Lande.«

## Apropo Guð og alt tað

**JOHAN Í KOLLAFIRÐI®**
fyrrverandi annaðleiðis radiovertur



Nú skilji eg endeliga trí inigheitina:
Útvarp Føroya, Lindin og Rás 2. Trý ymisk radio, og tó bert eitt.

# Føroya Felag móti Krabbameini varpar ljós á avvarðandi

**KRABBAMEIN**

Álvarslig sjúka rakar eisini avvarðandi. Tað ásannar eitt tað størsta sjúklingafelagið í Føroyum, Føroya Felag móti Krabbameini. Stórur partur av teimum, sum venda sær til felagið at fáa ráð og vegleiðing, eru avvarðandi at krabbameinssjúklingum. Tí skipar felagið í juni fyri skeiði fyri avvarðandi at krabbameinssjúklingum. Eisini verður skipað fyri almennum fyrilestri fyri avvarðandi at øllum, ið hava kroniska sjúku, sum krabbamein eisini kann vera. Tað verður Thorkild N. Jørgensen, psykoterapeutur, sum fer at hava skeiðið og halda fyrilesturin.

Fyrilesturin Álvarslig sjúka rakar eisini avvarðandi verður hósdagin 15. juni. Kl. 19.00 í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Skeiðið fyri vaksin avvarðandi at krabbameinssjúklingum Avvarðandi tørvar eina oasu verður leygardagin 17. juni frá kl. 9.00 til 16.30 í hølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Havn. Áhugað kunnu tekna seg hjá felagnum telefon 317959.

Fólk hava høvi at avtala samrøðu undir fýra eygum við Thorkild N. Jørgensen, ið er psykoterapeutur. Hann hevur arbeitt við sjúkraktum í nógv ár; hann hevur drúgvar arbeiðsroyndir sum psykoterapeutur og diakon. Soleiðis lýsir hann støðuna hjá avvarðandi: "Nógv avvarðandi brúka alla sína orku at nøkta tørvin hjá tí sjúka. Tað er natúrligt og rætt at vilja hjálpa teimum, ið standa tær nær. Men tað kann henda, at tú missir teg sjálva ella sjálvan burtur, og eitt slag av bundinskapi verður skapt, sum ikki er gott fyri nakran part. Júst hetta, hesin bundinskapurin, kann 'raka' tann avvarðandi," greiðir Thorkhild frá. "Setur tú sum avvarðandi tín egna tørv til viks, mást tú læra at síggja, hvørji støðu, tú ert í. Tað ber til at gera títt besta fyri tann sjúka uttan at missa teg sjálva ella sjálvan burtur. Og tað ber eisini til at koma til sættis við sorgina, pínuna og samvitskubitið, sum nærum altíð knýtur seg til at síggja onnur pínast. Meiningin er, at øll, eisini tann álvarsliga sjúki, kunnu fáa eina góða tíð saman. Avvarðandi tørvar eina oasu."

Áhugað kunnu venda sær til Føroya Felag Móti Krabbameini ella Thorkild N. Jørgensen við spurningum, áðrenn tey tekna seg til skeiðið.

Lesið meiri á:
www.krabbamein.fo
www.livifokus.dk
www.psykoterapeutforeningen.dk

Eisini ber til at ringja til Føroya Felag Móti Krabbameini, telefon 317959

# Yastrid Gulbrandson í Leikalund

Hóskvøldið kl. 20 var fernisering í Leikalund í Klaksvík, har Yastrid Gulbrandson hevur eina framsýning, sum verður er opin til 15 juni.

Yastrid var fødd í 1941 og vaks upp á Viðareiði til hon var 12 ára gomul, tá hon flutti til Klaksvíkar. Hon hevur búð í USA síðan 1965 sum 24 ára gomul, har hon er búðsitandi enn.

Yastrid fæst nógv við at mála, serliga tey seinastu árini hevur hon lagt nógva tíð í málningarnar. Hon hevur haft eitt minni egi virkið í USA í mong ár, har hon og aðrar kvinnur fáast við at gera "puppets", hetta er bamsir, dukkir og ymiskt annað ið tey seyma, Yastrid er pensionerað nú, men hevur tó úr at gera til dagliga.

Hon málar akvarell ella vatnlitismyndir sum tað kallast. Í málningum sínum leggur hon serliga dent á tað dagliga og dagligdagin, sum hon minnist hann, tá hon var ung í Føroyum, hetta evni verður ikki so ofta væl lýst í listini. Yastrid hevur tveir synir og trý ommuborn, ið búgva í USA.

Upplatingartíðirnar hjá Leikalund eru hesar:
Mán.-Leyg. 10.00 - 23.00
Sun. 16.00 - 23.00